Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Asfaltering av vegnum millum Skopun og Sand

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, nær vegurin millum Skopun og Sand verður asfalteraður aftur?
2. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, um koyritrygdin á vegastrekkinum verður mett at vera í lagi ?
3. Hevur landsstýrismaðurin gjørt eina raðfesta ætlan fyri viðlíkahaldið av landsvegakervinum í Føroyum?

Viðmerkingar:
Vegurin millum Skopun og Sand er nú í so vánaligum standi á summum vegateinum, at tú sum bilførari aftrar teg við at koyra á vegnum. Bilførarar kenna ampa av at koyra á vegnum, og koyritrygdin er hareftir.

Undirritaði spurdi landsstýrismannin í samferðslumálum líknandi spurning í vár, og tá svaraði landsstýrismaðurin, at partar av vegastrekkinum fóru at verða asfalteraðir í ár. Nú summarið er farið kann staðfestast, at einasta, sum er gjørt við vegin, er at rípur eru málaðar omaná illa farna asfaltlagið og holurnar í tí.

Fyri at fyribyrgja at skaði stendst av støðuni, verður landsstýrismaðurin biðin um at kanna støðuna og svara hesum spurningi.

Á Løgtingi, 9. september 2021

Páll á Reynatúgvu